gult cyan magenta svart



# Ófarlig fyri fólk

**Munn- og kleyvsjúkan, sum í løtuni gongur í Bretlandi, er ikki vandamikil fyri fólk, sigur landsdjóralæknin**

DJÓRASJÚKA
*Edvard Joensen*

Munn- og kleyvsjúka rakar ikki menniskju, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni. Tað hava verið onkur einstøk dømi, sigur hann, men tá hevur talan verið um fólk, sum dyrkaðu bakteriurnar á eini starvsstovu.

Og tað er als ikki vandamikið at eta neytakjøt, hóast sjúkan er ávíst í Europa. Soleiðis smittar hon ikki, sigur landsdjóralæknin.

Munn- og kleyvsjúka er ein virussjúka, sum rakar kríatur. Neyt, seyð og svín er tað vanliga. Eisini kunnu eitt nú ross fáa sjúkuna.

Tað sjúka kríatúrið fer at sleva og verður sárføtt, greiðir landsdjóralæknin frá. Og er talan um mjólkineyt, sleppast tey. Sleppa kríatúrini at liva, verða tey vanliga frísk aftur eftir nøkrum vikum, sigur Bjørn Harlou.

Tað, sum ger, at fólk ræðast sjúkuna so illa, er í stóran mun fíggjarligi missurin av, at kýrnar verða sleptar.

Men landsdjóralæknin sigur, at tað sjálvandi skal ansast sera væl eftir, at vit ikki fáa sjúkuna hendanveg. Smittan verður borin á ymsan hátt. Eitt er, at fólk og kríatúr ferðast í millum øki, og kunnu soleiðis bera smittuna. Ein annar møguleiki er, at smittan verður borin við vindi.

Tað er hent einaferð í Danmark. Tá var sjúkan staðfest í Eysturtýsklandi og kom stutt eftir til Danmarkar. Eingin flutningur hevði tá verið í millum londini, og tí varð hildið, at smittan var borin við vindi um Eystrasalt.

Hjá okkum skuldi tann vandin verið rættiliga lítil sum er, sigur landsdjóralæknin. Hann metir, at tað skal ein rættiliur stormur til at bera smittuna úr syðra parti av Englandi til Føroya.

Annars hava vit fullkomið innflutningsbann sum er, til nýggju ES reglurnar eru setta í gildi í Føroyum. Og eisini tá, kunnu vit seta bann fyri innflutningi av kríatúrum, kjøti og kjøtúrdráttum, um illgruni um er smittu.

Men sum er, er útflutningsbann úr Bretlandi, og bretar taka støðuna rættiliga álvarsliga. Teirra eftirlit og tiltøk eru so mikið strong, sigur Bjørn Harlov, landssjóralækni, at hann metir ikki reellan vanda vera á ferð í Føroyum í løtuni.









# Café Natúr

**Her á Sosialinum, hava vit avgjørt, í sambandi við teigin »Ì býin«, at fara út at vitja matstovunar kring landið, og síðani skriva um hvussu hetta royndist**

*Oda Ellingsgaard*

Vit hava verið inni á gólvinum hjá Café Natúr.

Café Natúr er eitt stað har nógv fólk samlast, tey seta seg niður at práta og fáa sær okkurt at eta. Og tað at fáa sær at eta er kanska serliga lekkurt nú Café Natúr júst hevur endurníggja teirra matarseðil. Nógv nýtt og leskiligt er at fáa, t.d. av víni, cafédrykkum, og fleiri nýggj sløg av sandwich. Hartil kann man eisini fáa heimagjørda lasagnu.

Tey eru eisini byrjaði at selja alt út úr húsinum.

Eg havi, saman við einari vinkonu, verið niðri Café Natúr og roynt hendan nýggja matarseðilin.

Vit koma inn og seta okkum niður, hetta er ein mánadag klokkan trý, so tað vóru ikki so nógv fólk har.

Matarkortini koma beinavegin á borið. Tað er sera ringt at velja hvat vit skulu eta, alt ljóðar so lekkurt. Eg geri av at eg vil hava eina Café Natúr Sandwich; Ciabattina við skinku sum kostar 42 krónur. Og Silvia fær sær eina Sesam Sandwich við kylling, salat, karrydressing, ananas, majs, piparfrukt, agurk og bacon fyri 45 krónur.

Tað gongur ein løta, og vit sita og práta. So kemur maturin á borið, tað sær sera spennandi út og vit leggja í vagið. Tað smakkar ótrúliga væl.

Vit sita eina løtu og nýta hendan lekkra mat.

Tá ið vit eru lidnar, kemur eitt av starvsfólkinum. Hann spyr um vit ikki vilja hava omaná, tað halda vit ljóðar lekkurt. Sjálvt um vit eru mettar, so keypa vit okkum omaná.

Eg velji mær pannukøkur við ísi og súltutoy, og Silvia fær sær ískakao.

Vit geva okkum góða tíð, vit eru mettar av rættunum vit júst hava eti, men tað smakkar eisini so væl at vit vilja geva okkum tíð til at nýta hetta.

Vit sita eina løtu og bara práta saman og hugna okkum.

Vit vóru sera væl nøgdar, bæði við matin og við starvsfólkini sum vóru sera blíð við okkum og vit fingu sera góða tænastu.

Ein følir seg vælkomnan inni í Café Natúr, har er reint og ruddeligt og ein fær góða tænastu..









## Streymoy







## Á matarseðlinum

| | |
|---|---|
| **HEITIR RÆTTIR m.a.** | |
| Frikadellir v/epla røsti & tza tzi ki | 49,- |
| v/eplasalati & reyðkáli | 49,- |
| **SANDWICH m.a.** | |
| Kalkun & salat: karrydressing, ananas, majs, piparfrukt, agurk & bacon. | 45,- |
| **OMANÁ m.a.** | |
| Pannukøkur v/ísi ella róma | 25,- |
| **CAFÉ DRYKKIR m.a.** | |
| Cappucino Viennese | 25,- |
| Kakao Special | 30,- |

*seljast eisini út við í termokrússum*

*livandi tónleikur*

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25




Leygarkvøldið:
- Úr Vestmanna kl. 24
- Úr Tórshavn kl. 01
- Úr Vestmanna kl. 04
- Úr Tórshavn kl. 05

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu



www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



## Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið Sosialurin

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

## Vilja tygum við í

## Í býin - hvønn hósdag

Ynskja tygum at lýsa í teiginum ***í býin***, so fyllið út henda lepan og sendið hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur

gult cyan magenta svart